# r aftur

hann heldur, at vit hava lyndi til at stara okkum blind uppá tær forðingar sum eru fyri at menna vinnulívið.

– Seinastu tíðina hevur tað gingið illa. Men hetta verður sum ein ónd ringrás, har tað tykist sum um at vit bara síggja forðingarnar og ikki tær avbjóðingar vit standa fyri og teir møguleikar, vit hava.

– Men tað verður neyðugt at bróta hesa óndu ringrásina. Ístaðin fyri at síggja forðingarnar, eiga vit at hugsa nógv meiri um teir møguleikar, vit hava fyri at menna oynna.

Og Søren Lünell Bruhn heldur, at møguleikarnir fyri at menna Suðuroynna eru ikki so smáir og fáir.

– Umframt onnur skip, hoyrir ein stórur partur av djúpvatnstrolarunum í flotanum til Suðuroynna.

– Vit hava eisini nógv fiskavirki á landi. Vit hava stóra frystigoymslu. Og okkara bestu fiskigrunnar eru beint sunnanfyri Suðuroynna. Og hvaðani úr Føroyum er tað styst niður á marknaðin? Tað er úr Suðuroynni.

– Bera vit okkum rætt at, hava vit sostatt allar fortreytir fyri at skapa vøkstur í Suðuroynni.

Men hann heldur, at tað er eisini ein fortreyt, at vit finna eina skipan so at bátarnir fáast at avreiða til virkini í Suðuroynni.

Søren Lünell Bruhn hevur onkur hugskot um, hvussu tað kann gerast. Men enn eru tey ov lítið fyrireikað til at hann vil siga meiri um tey.

– Mítt mál er at gera Suðuroynna til eina framleiðsluoyggj. Vit hava allar fortreytir fyri at gera Suðuroynna til Føroya framleiðsluoyggj nummar eitt. Tað er bara at leggja til brots og at fara til verka.

– Tað skal verða Suðuroynna, sum skipini sigla til við fiskinum at avreiða og tað skal verða Suðuroy, sum skipini sigla frá við fiskinum niður á marknaðin.

– Vit skulu bara savna allar tær góðu kreftirnar, sum eru í oynni. Vit mugu øll somul seta okkum niður í felag og tosa um møguleikarnar og syrgja fyri, at tað endar við ítøkiligum tiltøkum.

Og stjórin í Sparikassanum ætlar at hava ein virknan leiklut í royndunum at samskipa og fyrireika tað arbeiðið, sum skal til.

– Eydnast hetta, so tað nokk fara at ganga framá aftur í Suðuroy, tað eri eg heilt vísur í, sigur nýggi stjórin í Suðuroyar Sparikassa.

– Fyri nøkrum árum síðani var Suðuroy feskfiskaoyggj nummar eitt í Føroyum. Og tað kunnu vit verða aftur, sigur Søren Lünell Bruhn.

Men hann ivast ikki í, at tað vánaliga flutningssambandið ímillum Suðuroynna og umheimin er ein orsøk til trupulleikarnar hjá vinnulívinum í Suðuroynni.

– Tað mesta skal til Havnar fyrst og tað er ein trupulleiki.Vit hava allar hentleikar og vit eru nærmast við marknaðin. Tað logiska hevði verið at flutt alt norðaneftir til Suðuroyar og so varð tað ført hiðani og niður á marknaðin.

– Tí heldur hann, at ein beinleiðis ruta ímillum Suðuroynna og Skotland, er neyðugt.

Hinvegin er hann sannførdur um, at framgongdin hjá Suðuroynni skal byggja á eitt burðardygt vinnulív á privatum grundarlagi.

– Eg trugvi ikki upp á eitt alment stýrt vinnulív. Tíðin, eg arbeiddi í danska kappingarráðnum sannførdi meg um, at almenn stýring av vinnulívinum er ikki serliga heppin.

Kortini heldur hann, at tað hevði verið ein stórur fyrimunur at fingið meiri vágafúsan pening í Suðuroynna.

– Tí hevði ein Suðuroyargrunnur kanska verið ein fyrimunur. Men tað skal vera við størsta varsemi, tí tað er ikki altíð, at almennir grunnar eru so hepnir. Tað hava vit royndir av. Eitt nú leggur tað stórt trýst á politikarar at fáa teir at ávirka virksemið hjá grunninum. Tað er óheppið og kann vera ein forðing fyri at grunnurin verður rikin á vinnuligum grundarlagi burturav.

– Ein annar máti kundi verið at gjørt tað lokkandi hjá vinnulívsfólki norðanfjørðs at gjørt íløgur í Suðuroynni. Men ein grunnur hevði kanska verið tann skjótasta loysnin, heldur hann.

Men hann heldur eisini, at tað hevði verið ein stórur fyrimunur at fingið størri fjølbroytni í vinnulívið í Suðuroy.

Tí heldur hann eisini, at tað kann vera rætt at flyta almenn arbeiðspláss suður.

– Tað kundi givið ein ávísan tryggleika. Men tað, sum hevur nógv størstan týdning, er at fáa gongd á vinnulívið aftur, tí tann ófaklærda arbeiðsmegin er stór, so tað er stórt trot á vanligum arbeiðsplássum. Tað verða ikki almenn arbeiðspláss, sum koma at seta gongd á Suðuroynna aftur.

– Hinvegin átti tað ikki at verið óhugsandi hjá vinnulívsfólki norðaneftir at sett seg niður í Suðuroy, her húsaleiðan er helvtina av tí, hon er í Havn.

– Eitt nú skuldi ikki nakað verið í vegin fyri at KT- virki settu seg niður í Suðuroy. Í hesum sambandi heldur hann, at Fróðskaparsetrið kundi umhugsa at lagt KT- deildina í Suðuroy.

– Vit hava brúk fyri fjølbroytni í vinnulívinum, sigur Søren Lünell Brun.

**Neyðugt at samansjóða Suðuroynna**

*Longur frammi í greinini vísir tú á, at at tú fer at virka fyri, at Vinnuráðið í Suðuroyar Syðru helvt, verður gjørt til eitt vinnuráð fyri alla oynna. Heldur*

**Framhald á s. 24**

# Endaði í Føroyum av tilvild



*Søren Lünell Bruhn tók útbúgving í leiðslu á Robert Gordon University í Aberdeen Hendan útbúgvingin ger hann ikki til ein góðan leiðara, men hon hevur givið honum nøkur hent amboð og eina góða barlast, nú hann skal øva seg í verða leiðari.Her eru hann og konan, Rudi Nielsen, avmyndað, tá ið hann fekk prógvið frá Robert Gordon University*

*Mynd: Jan Müller*

**Hóast nýggi stjórin í Suðuroyar Sparikassa er ungur, hevur hann ikki sørt av royndum**

Søren Lünell Bruhn er 30 ára gamal. Hann er føddur og uppvaksin í Struer í Danmark, har hann tók studentsprógv í 1993.

Hann varð cand. polit við Keypmannarhavnar Universitet í 2000. Síðan hevur hann á Robert Gordon Universetinum í Aberdeen tikið eina útbúgving í leiðslu sum nevnist "Master of Manegment".

Tað var ikki ætlanin, at hann skuldi enda í Føroyum, tí hann tað, sum hann hevði sæð fyri sær, var, at hann skuldi liva og virka í Danmark.

Men tann søgan um, hvussu hann endaði í Føroyum, er tann klassiska: Hann møtti eini gentu av Tvøroyri, sum vildi sleppa heimaftur at búgva og so fylgdi hann við.

– Men her er gott at búgva, so tað havi eg ikki angra eina einastu løtu, sigur hann.

Søren Lünell Bruhn hevur góðar royndir í sínum yrki sum búskaparfrøðingur og hóast hann er dani, er hann vælkendur við føroysk viðurskifti.

Hann hevur verið fulltrúi bæði í danska og í føroyaska fíggjarmálaráðnum, og harafturat hevur hann arbeitt eitt skifti í danska Kappingarráðnum.

Í 2003 varð hann fíggjarleiðari á Almannastovuni í Føroyum.

Søren Lünell Bruhn býr á Tvøroyri, haðani konan, Rudi Nielsen, sjúkrarøktarfrøðingur, er.

Saman eiga tey ein hálvtriðja ára gamlan son, sum eitur Jens Erik eftir abbanum, men í mai verða tey foreldur fyri aðru ferð.

Søren Lünell Bruhn byrjaði í Suðuroyar Sparikassa 1. desember í fjør, har hann tann fyrsta mánaðin arbeiddu saman við stóranum sum var, Mikkjali Sørensen.

Men 1. januar tók hann við sum stjóri og samstundis fór Mikkjal Sørensen úr starvi, eftir at hann segði upp í heyst.